# Stongd støða í fíggjarheiminum

**Eitt verkfall er altíð úrslit av eini fastlæstari støðu millum minst tveir partar á arbeiðsmarknaðinum. Verandi ósemja á fíggjarmarknaðinum hevur fleiri partar, enn teir vanligu**

ANALYSA
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*


*Framvegis røkist onki fyri nakrari semja millum partarnar í fíggjarheiminum*

*Savnsmynd*

Umframt áhugamálini hjá høvuðspørtunum, AFF (Arbeiðsgevarafelagið fyri Fíggjarstovnar í Føroyum) og Finansforbundet, ið umboðar starvsfólkini í Føroya Banka, standa nógv onnur áhugamál upp á spæl í verandi trætu.

Hjá YFF (Yrkisfelagið fyri Fíggjarstovnar í Føroyum), ið umboðar hini 70 prosentini av starvsfólkunum í føroyska fíggjarheiminum, er ósemjan sera óheppin. Í staðin fyri at kunna vísa samhuga við starvsfeløgum á kappandi arbeiðsplássum, er felagið í teirri støðu at hava gjørt ein sáttmála, sum tey sjálvandi ikki ynskja verður yvirhálaður av starvsfólkunum í Føroya Banka og Trygd.

Sum Sosialurin vísti á í síðstu viku, stendur eisini stjórin í Eik, Marner Jacobsen, í tí løgnu støðu at leiða samráðingarnar, sum ikki fevna um hansara egnu starvsfólk í Eik, men um starvsfólkini hjá størsta kappinganeytanum, Føroya Banka. Gevur hann seg yvirfyri krøvunum hjá Finansforbundet, leggur hann trýst á seg sjálvan sum stjóra í Eik, tí so er ógvuliga ivasamt, um sáttmálin millum AFF og YFF verður staðfestur á aðalfundinum hjá YFF í heyst.

Umframt at skapa órógv millum millum starvsfólkini vil ein møgulig vraking av av hesum sáttmálanum koma at kosta Eik bæði krónur og orku til at fáa ein nýggjan sáttmála í lag. Tað sama er galdandi fyri næstformannin í AFF, Gunnar í Liða, sum er stjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar.

Lítlibeiggin í hesum spælinum er forstjórin í Føroya Banka, Janus Petersen, sum stendur í eini sera óhepnari støðu. So leingi bankin er limur í arbeiðsgevarafelagnum, er leiðslan noydd at vera solidarisk við sínum størstu kappingarneytum, og brýtur bankin út, er tað eitt tekin um, at leiðslan er til reiðar at geva sínum starvsfólkum ein betri sáttmála, enn hini fáa.

Hinvegin, so ber ikki til hjá hvørki leiðslu ella nevnd í Føroya Banka bara at standa og hyggja at, meðan bankin koyrir við minni enn 20 prosent av orkuni. Óansæð hvussu snúðað og vent verður, so er valla nakar ivi um, at hetta fer at kosta í síðsta enda, nú Føroya Banki stendur til at verða seldur innan 1. juli.

Ein annan leiklut í stóra matadorspælinum hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag og Vinnuhúsið, sum fyri alt í verðini ikki vilja hava, at ein fakbólkur fær betri sømdir ella meiri í posan enn ein annar starvsfólkabólkur. Óttin er, at hetta kemur at breiða seg á arbeiðsmarknaðinum og órógva sáttmálasamráðingar við aðrar fakbólkar.

Einki samband er millum partarnar, men sum skilst, so fylgja semingsmenninir, Alfred Petersen og Jógvan Amonsson, væl við, hvat hendir, sjálvt um teir ikki beinleiðis eru í gongd við nakra semingsroynd júst í løtuni.

Tí er framvegis orangeklødd starvsfólk úr Føroya Banka og Trygd at síggja í gøtumyndini í Havn, har tey mótmæla frammanfyri dyrnar hjá bankanum og Trygd.




## Lyklaklár fígging og trygging til bilin

Ætlar tú at keypa bil, bjóða vit tær fígging og trygging um eina leið. Tú fert beint inn á bilasøluna, har tú fært landsins bíligastu og skjótastu fígging beinanvegin. Í somu vending avgreiða vit tryggingina. Tú fært lykilin og koyrir avstað.

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn,
Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari